# Hanus til B36

**Við longdum sáttmála við Alex dos Santos og tilgongd av Hanusi Thorleifssyni úr Skála tykist B36 hava styrkt sær um vinstru síðuna á liðnum**

B36
*Jákup Møk*

Hóast meistarar, so tykist B36 ikki hava nakrar ætlanir um at liggja á teirri løtu síðuni, tá tað ræður um fyrireikingar til komandi kappingarárið.

Av fráfallið eru givni Allan Mørkøre og nú seldi Ingi Højsted einastu spælararnir, sum við vissu ikki verða við aftur næsta ár. Sylla er komin til felagið úr ÍF, og í aðrar mátar er mest sum víst, at restin av hópinum heldur fram. Einasti útlendingurin, sum tó við vissu eisini verður við komandi ár er Alex dos Santos. Hann varð eisini kosin sum ársins B36-spælari av viðhaldsfólkunum, og tí er einki at siga til, at hesi vórðu fegin, tá formaðurin á ársveitsluni kundi boða frá, at partarnir høvdu gjørt nýggjan tvey-ára sáttmála, áðrenn spælarin fór til Brasilia.

Og nú er so eisini greitt, at nýggjur maður kemur á vinstra miðvallarborð. Talan er um 19 ára gamla Hanus Thorleifsson av Skála. Hóast sín unga aldur, so hevur hann seinastu tvey árini verið mest sum fastur partur av góðu Skála-avriunum.



*Hóast unga aldurin, so hevur Hanus Thorleifsson verið fastur partur á sterka Skálaliðnum, har hann fyri tað mesta hevur røkt plássið á vinstra miðvølli. Nú verður tað so við - og ikki ímóti - B36, at hann skal kappast*

# VB og Sumba ganga saman aftur

**Á eykaaðalfundi í VB hóskvøldið var stórur meiriluti fyri, at tað eisini næsta ár skal samstarvast við Sumba**

FÓTBÓLTSSAMSTARV
*Jóannes Hansen*

Í ár vóru tey saman. So vildu vágbingar taka sundur aftur, og nú bendir alt aftur á, at sumbingar og vágbingar eisini næsta ár fara at vera felags um fótbóltsliðini í tveimum teimum ovastu deildunum.

VB heimasíðan - vb1905. fo - veit at siga, at á triðja VB eykaaðalfundinum í tvær vikur varð hóskvøldið stórur meiriluti fyri at taka samstarvið við Sumba uppaftur. 41 atkvøður vóru fyri, og trettan vóru ímóti.

Síðani eykaaðalfundin, sum var fyrr í vikuni, hevur leiðslan í VB verið í sambandi við Sumbiar Ítróttarfelag, sum alla tíðina hevur verið hugað í, at samstarvið skuldi halda fram. Sambært VB heimasíðuni verður útgangsstøðið fyri samstarvinum avtalan, sum hevur verið galdandi í farna ári, men onkrar broytingar skulu gerast í avtaluni. Hesar skulu fáast upp á pláss av nevndunum, áðrenn samstarvið formliga verður undirskrivað.

Nýggjur formaður í fótbóltsnevndini hjá VB er Erhard Joensen. Hann varð hóskvøldið valdur í staðin fyri fyrrverandi formannin, sum arbeiðir í Danmark.

# Nú skifta deildirnar navn

Eftir øllum at døma broyta fótbóltsdeildirnar navn frá komandi kappingarárið at rokna. Sambært skránni, sum FSF hevur latið feløgunum til árliga fundin, sum verður nú leygardagin, so tykist hetta í øllum førum vera eitt av evnunum.

Undir »Broyting í kappingarreglum fyri fótbólt« stendur at lesa, at hesar millum annað snúgva seg um Formula-deildina, 1. deild, 2. deild o.s.fr.

Tað fær illa merkt annað, enn at heitini á deildunum ætlandi skulu broytast samsvarandi teimum broytingum, sum eru sæddar uttanlands.

So er spurningurin, hvørt tað fer at eydnast FSF at fáa feløgini at góðtaka hetta. Sum skilst, so hava feløgini verið nakað firtin um, at býtislykilin av Formula-inntøkunum enn ikki er greitt ásettur. Sagt verður, at á fundinum í vár - tá sponsoravtalan varð góðtikin - var semja samstundis um, at endaligi býtislykilin seinni skuldi ásetast í samráð við feløgini.

Fleiri feløg siga tó, at tey ikki eru tikin upp á ráð, men at tey hava fingið útgoldið 25.000 kr. hvør. Altso íalt 250 tkr. - svarandi til helmingin av árligu stuðulsupphæddini.

**-mørk**

---

# Innanhýsis mál skulu eisini telja

Tað er eitt FIFA-krav, at reglugerðirnar hjá ymsu fótbóltssambondunum kring knøttin nú skulu standardiserast. Hetta soleiðis at FIFA - og í seinasta enda ítróttardómstólurin í Lausanne - altíð hava einsljóðandi reglur at halda seg til, tá trætumál skulu avgerast.

Tað inniber millum annað, at broytingar eisini verða gjørdar í føroysku kappingarreglunum. Ein av hesum broytingum verður, at frá komandi kappingarári skulu mál skotin á útivølli vektast tyngri, um tað stendur á jøvnum millum lið í stigum.

Sum er staðfesta føroysku reglurnar, at stendur á jøvnum í stigum, eru stig í innanhýsis uppgerðum avgerandi. Stendur eisini á jøvnum her, verður samlaði málmunurin avgerani. Altso telur málmunurin í innahýsis dystum ikki við í hesum - og tiansheldur mál skotin á útivølli.

Verður hetta rættað, er hetta tó eisini í størri samsvari við ætlanina handan verandi reglugerð. Tá varð broytingin serliga ætlað yngru deildunum, har tað fleiri ferðir er komið fyri, at tvey javnt sterk lið enda á sama stigatali. Hetta tí tey vinna á øllum hinum liðunum, og so kanska vinna hvør sína innanh‡sis uppgerð - ella spæla báðar javnar.

Í uppskotinum varð dentur tá lagdur á, at tað í slíkum førum neyvan var ítróttarliga rætt, at avgerðin skuldi takast út frá, hvørt annað liðið hevði vunnið 3- ella 10-0 á onkrum av veikaru liðunum, og tí skuldu innanhýsis uppgerðir teljast fyrst. Í lógartekstinnum varð tó eitt mistak, sum førdi til, at hetta bert kom at fevna um stig í innanhýsis dystum. Ein avgerð, sum varð til dómsnevndarviðgerðar bert tvey umfør áðrenn kappingarlok, tá VB og HB vóru ájøvn í stigum. Og so var upprunaliga ætlanin við lógartekstinum brádliga ikki galdandi longur.

Hetta er tó ongan tíð broytt á aðalfundum síðani, men við nýggju FIFA-reglunum er nú líkt til, at mistakið verður rættað.

**-mørk**

---

# Kringvarps-sáttmálin á skránna

Sum vit hava skrivað áður, so hevur tað elvt til stóra misnøgd, at Kringvarpið higartil hevur sýtt fyri at nýta sponsornøvn í ítróttarsendingum sínum. Eitt nú hevur hetta verið staðfest, tá Hond- og Fótbóltssambandið hava gjørt stuðulsavtalur um navngeving av kappingum.

Hetta hevur fingið FSF til at »blokera« samráðingum um nýggjan sáttmála millum ÍSF og Kringvarpið. Verandi sáttmáli er sagdur upp til 1. januar, og FSF hevur sett sum ófrávíkiligt krav, at skulu teir vera við, so vilja teir treyta sær, at »røttu« heitini verða brúkt. Hartil hevur staðfestingin frá ÍSF verið, at teir gera ikki ein sáttmála, uttan so at hesin er kollektivur. Tað vil siga at øll sersambondini kunnu góðtaka hendan.

Higartil hava nakrir fundir verið millum ÍSF og Kringvarpið, og við tann seinasta av hesum vóru umboð fyri FSF eisini við.

Kunning um gongdina í málinum er sett á skránna, nú feløgini og FSF hava fund. Og roknast kann við, at FSF her vil lodda dýpið, um feløgini framhaldandi eru samd um at halda eins fast um kravið.

# Sørvágs-kvinnur í Trongisvági

Tveir dystir eru á skránni í bestu flogbóltsdeildini hjá kvinnum um vikuskiftið. Serstakliga tykist talan at verða um áhugaverda uppgerð, tá SÍ kemur á vitjan hjá TB.

Júst hesi bæði liðini dystaðust seinasta vikuskiftið í finaludystinum í FK-kappingini. Tann dystin vann TB, men talan var um fyrstu veruligu finaluna, sum SÍ hevur spælt, og tí er einki at ivast í, at tær vilja leggja nógv fyri, nú tapið skal hevnast.

Hin dysturin er millum KÍF og Mjølnir.

**-mørk**

# 5-mannafar til Knørrar-felagið

Heimasíðan hjá Havnar Róðrarfelag, www. drekin.fo, veit at siga, at høvuðsstaðurin fær spildurnýtt 5-mannafar til komandi kappróðrarár.

Tað er Róðrarfelagið Knørrur, sum letur hetta smíða, og kemur felagið soleiðis at hava umboðan í trimum bátastøddum komandi kappingarár. Framman undan hevur felagið Knørr og Jarnbard.

Jannie Dam Jacobsen, formaður í Knørri, sigur við heimasíðuna, tey ætla sær at hava tríggjar manningar til bátin, sum Sámal Hansen hevur smíðað.

**-mørk**

# Ciezlewicz aftur til Liverpool

Herfyri var ungi VB-spælarin, Adrian Ciezlewicz, á venjingaruppihaldi í enska stórfelagnum, Liverpool. Eftir øllum at døma vóru teir í Mersyside-felagnum sera væl nøgdir um tað, sum teir sóu. Teir hava í øllum førum biðið um, at spælarin kemur til felagið eina ferð afturat.

Jákup í Stórustovu, umboðsmaður, váttar eisini, at so er, men hann dugir ikki við vissu at siga, júst nær Adrian fer aftur til Onglands.

**-mørk**